## Armstrong flutti tyrlu

Spenningurin hevur verið stórur, men fram til í nátt hevði Lance Armstrong ikki veruliga sýnt gomlu styrki sína, nú hann við luttøkuni í Tour Down-Under er í ferð við sítt comeback á hjólhestinum. Á triðju etapuni í gjár var hann tó partur av einum útbroti, og hetta vakti stóran ans. Ein tyrla fylgdi við tí, sum fyrifórst, men tá Armstrong helt trýstið frá hesari órógvað súkklararnar, gav hann fyriskiparunum boð um, at tyrlan skuldi burtur, og hetta eydnaðist eisini hjá amerikanska súkklukonginum.



## City skilir einki

Hóast ørandi upphæddir stóðu honum í boði, so fer brasilski Kaka ikki til enska Manchester City. Og sambært brasiliumanninum ganga nógv ár, áðrenn Manchester City verður nakað stórfelag. – Har var eingin teirra, sum hevði ánilsi fyri, hvat teir í veruleikanum vildu. Og satt at siga havi eg fingið eina byrðu av mínum herðum, nú samráðingarnar endaðu uttan úrslit, sigur Kaka sambært italskum miðlum.

## Ov lítið hugflog

- Vit tapa seinna hálvleik við átta málum, eftir at vit vunnu fyrra við fimm málum. Tað er sjálvandi ikki nøktandi.

Soleiðis sigur Janus Sørensen, sum skjeyt trý av føroysku málunum í gjár. Hoyvíkingurin staðfestir, at glottar vóru á føroyska liðnum undan hvíldini.

- Tað er ov lítið hugflog í álopsspælinum eftir steðgin. Verjan stóð ikki eins væl, og avrikið sum heild er ikki í lagi. Tað riggar væl hjá okkum í løtum í fyrra hálvleiki, og tað er sjálvandi positivt. Sigurin hjá Grønlandi var uppiborin, men tað kunnu vit bara takka okkum sjálvum fyri, staðfestir Janus Sørensen.

**- uni**



*Tað var munur á andlitsbráunum í báðum legunum eftir dystin. Her síggja Kári Nielsen og Sámal Joensen alt annað enn nøgdur út, meðan grønlendsku starvsfelagar teirra hava munandi lættari við at finna smílið fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ørskapurin manglaði

Jakob Andreassen, grønlendski landsliðsvenjarin, staðfesti, at grønlendska liðið var í stórum trupulleikum í fyrra hálvleiki.

- Vit mangla ørskap undan steðginum. Men í seinna umfarinum verður betri, og vit taka av møguleikunum. Men vit eru sera væl nøgdir. Liðið er sera ungt og í stórari menning. Vit høvdu bara 10 leikarar við í ferðalagnum, og vit hava allir havt ein frálíkan dag í Føroyum. Vónandi verður hetta gjørt aftur, sigur Jakob Andreassen, grønlendski landsliðsvenjarin, í stuttari viðmerking.

**- uni**

## Sámal fekk krampa

Tað kom dátt við hjá føroyska liðnum, at toppskjúttin Sámal Joensen noyddist at taka seg aftur einu løtuna í seinna hálvleiki. Orsøkin var, at vestmenningurin fekk krampa í tjúkkan. Tað tók broddin av føroyska álopsspælinum, sum annars riggaði væl í fyrra umfarinum.

**- uni**

## Takkar fyri gestablídni

Rasmus Larsen, sum í løtuni umboðar danska Otterup, takkar føroyingunum fyri gestablídni undir dystinum.

- Eg meti, at um vit spældu um stig í dag, høvdu vit fingið ein torførari og meira fysiskan dyst. Eg kann ikki annað enn takka føroyingunum fyri gestablídni, staðfestir Rasmus Larsen brosandi.

Rasmus Larsen leikti í gjár sín landsdyst nummar 87 fyri Grønland. Tað sjáldsama er, at Grønland tilsamans hevur leikt 87 landsdystir í hondbólti.

**- uni**

## Nøgdur við fyrra hálvleik

Toppskjúttin á føroyska liðnum, Sámal Joensen, sigur seg vera væl nøgdan við fyrra hálvleik í gjár.

- Vit standa okkum væl undan steðginum. Vit hava ferð á bóltinum og hugflog í álopspartinum. Eftir hvíldina verður spælið ov einstáttað, meðan alt riggar hjá teimum, sigur Sámal Joensen, sum í alt skjeyt átta av føroyskum málunum.

**- uni**

## Mistøkini kostaðu

Kári Nielsen, annar av føroysku venjarunum, staðfestir, at mistøkini kostaðu dýrt í seinna hálvleiki.

- Vit gera ov nógv mistøk eftir steðgin. Vit misnýta fleiri upplagdar møguleikar, og spælið riggar heldur ikki serliga væl.

*Hevur úrslitið nógv at týða?*

- Sjálvandi vildu vit vinna. Men vit vildu samstundis síggja allar leikararnar á vøllinum. Úrslitið kemur heldur ikki óvart á meg, tí grønlendskur hondbóltur er í stórari menning. Tað vóru tó fleiri glottar í dag. Í fyrra hálvleiki umstillaðu vit okkum væl og hildu avtalurnar, sigur hann.

Kári Nielsen staðfestir eisini, at tað kom dátt við, at Sámal Joensen noyddist at taka seg aftur í seinna hálvleiki.

- Hann var ein støðug skothóttan allatíðina. Og tá Finnur Hansson og Áki Mørk ikki reiðuliga raktu dagin, merktist tað væl, greiðir Kári Nielsen frá og leggur afturat, at tað var týðiligt, at Grønland hevði leikarar, sum spæla í bestu donsku deildini.

**- uni**

# Noreg snávaði ímóti Serbia

**Danmark og Svøríki vunnu tryggar sigrar**

HONDBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

So blivu tey norðurlendsku hagtølini brotin í HM endaspælinum í Kroatia. Noreg tapti tepurt 26-27 ímóti Serbia í bólki D. Serbia førdi 12-10 í hálvleikinum. Seinastu løtuna tóku norðmenn málverjan út, og spældu við 7 monnum úti fyri at kunna tryggja sær tað eina stigið, men Erlend Mamelund gav bóltin burtur, og so fór tann royndin í vaskið. Í annaðkvøld kl. 19.15 møtast Danmark og Noreg.

Í sama bólki vann Danmark ein tryggan 26-17 sigur yvir Egyptalandi. Støðan í hálvleikinum var 12-7 til Danmark. Danski venjarin, Ulrik Wilbek var væl nøgdur við danska verjuspælið og málverjan Kasper Hvidt, men hann helt ikki, at álopið riggaði nóg væl. Lars Christiansen gjørdist toppskjútti við 7 málum.

Svøríki vann 30-19 á Kuwait í bólki D. Hálvleiksstøðan var 17-9 til Svøríki.

### Úrslitini í gjár :

**Bólkur A:**
Ungarn-Argentina 31-20
Australia-Rumenia 20-40
Slovakia-Frakland 26-35

**Bólkur B:**
Kuba-Suðurkorea 26-31
Kroatia-Spania 32-22
Svøríki-Kuwait 30-19

**Bólkur C:**
Makedonia-Týskland 23-33
Algeria-Russland 28-29
Pólland-Tunesia 31-27

**Bólkur D:**
Saudi Arabia - Brasilia 24-26
Danmark-Egyptaland 26-17
Noreg-Serbia 26-27

**HM-støðurnar**

**Bólkur A**

| | | d | v | j | t | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Frakland | 4 | 4 | 0 | 0 | 141-84 | 57 | 8 |
| 2 | Ungarn | 4 | 3 | 1 | 0 | 126-88 | 38 | 7 |
| 3 | Slovakia | 4 | 2 | 1 | 1 | 124-96 | 28 | 5 |
| 4 | Rumenia | 4 | 2 | 0 | 2 | 118-107 | 11 | 4 |
| 5 | Argentina | 4 | 0 | 0 | 4 | 97-121 | -24 | 0 |
| 6 | Australia | 4 | 0 | 0 | 4 | 60-170 | -110 | 0 |

**Bólkur B**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kroatia | 4 | 4 | 0 | 0 | 140-89 | 51 | 8 |
| 2 | Svøríki | 4 | 4 | 0 | 0 | 136-88 | 48 | 8 |
| 3 | Spania | 4 | 2 | 0 | 2 | 144-103 | 41 | 4 |
| 4 | Suðurkorea | 4 | 2 | 0 | 2 | 116-103 | 13 | 4 |
| 5 | Kuwait | 4 | 0 | 0 | 4 | 76-151 | -75 | 0 |
| 6 | Kuba | 4 | 0 | 0 | 4 | 80-158 | -78 | 0 |

**Bólkur C**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 4 | 3 | 1 | 0 | 117-93 | 24 | 7 |
| 2 | Pólland | 4 | 3 | 0 | 1 | 123-101 | 22 | 6 |
| 3 | Russland | 4 | 2 | 1 | 1 | 113-109 | 4 | 5 |
| 4 | Makedonia | 4 | 2 | 0 | 2 | 109-106 | 3 | 4 |
| 5 | Tunesia | 4 | 1 | 0 | 3 | 107-117 | -10 | 2 |
| 6 | Algeria | 4 | 0 | 0 | 4 | 89-132 | -43 | 0 |

**Bólkur D**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 4 | 4 | 0 | 0 | 135-93 | 42 | 8 |
| 2 | Noreg | 4 | 3 | 0 | 1 | 134-91 | 43 | 6 |
| 3 | Brasilia | 4 | 2 | 0 | 2 | 106-133 | -27 | 4 |
| 4 | Serbia | 4 | 2 | 0 | 2 | 123-117 | 6 | 4 |
| 5 | Egyptaland | 4 | 1 | 0 | 3 | 85-104 | -19 | 2 |
| 6 | Saudi Arabia | 4 | 0 | 0 | 4 | 78-123 | -45 | 0 |